**Jørgen Niclasen**
**løgtingsmaður**
**vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 30/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi** (Strika uppboðssølu av rættindum á Flemish Cap)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**
(Strika uppboðssølu av rættindum á Flemish Cap)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 20. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 15, stk. 1 og 2 verður "nr. 1-6" broytt til: "nr. 1-5".

2. Í § 15, stk. 1. verður nr. 5 strikað. Nr. 1-6 verður eftir hetta nr. 1-5.

3. Í § 90, stk. 1 verður tvær staðni "nr. 5 og 6" broytt til: "nr. 5".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar:**
Endamálið við uppskotinum er, at heimildin hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at selja part av kvotunum á Flemish Cap, verður tikin burtur.

Seinastu árini hava verið sera tung hjá heimaflotanum. Nú sæst ein glotti, tí kvoturnar á Flemish Cap sannlíkt verða hækkaðar. Sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, skal øll henda hækking seljast á uppboðssølu. Heimaflotin hevur kempað fyri at knógva undir lakum fiskiskapi, men nú útlitini eru frægari, skal allur vøksturin takast frá teimum. Hetta er dárahugburður móti vinnuni.

Uppskotið tryggjar, at landsstýrismaðurin ikki sleppur at taka lítla batan frá heimaflotanum. Hinvegin vil uppskotið tryggja, at heimaflotin kann fáa møguleikan at royna henda glottan.

Fyri at tryggja størsta virðið fyri veiðuna á Flemish Cap er neyðugt at lata hesar kvotur sum eginkvotur. Tað vil tryggja, at fiskurin verður veiddur, tá mest fæst fyri hann. Hesa heimild hevur landsstýrismaðurin og verður tikið sum givið, at landsstýrismaðurin nýtir hesa heimild. Tí er ikki mett neyðugt at hava tað við í uppskotinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Landskassin vil fáa færri inntøkur frá uppboðssølu av fiskirættindum, meðan heimaflotin og tess manningar fáa hægri inntøkur og harvið eisini hægri skatt til land og kommunur.

**Serligar viðmerkingar:**
Til § 1:
Í § 15 stk. 1, nr. 5 er ásett, at landsstýrismaðurin kann selja 15% av fiskirættinum á Flemish Cap, um heildarkvotan er lægri ella ájavnt við 3100 tons av toski og um kvotan er yvir 3100 tons, so skal landsstýrismaðurin selja á uppboðssølu tað, sum er yvir, sbrt. § 15, stk. 2. Við lógarbroytingini verður ásetingin strikað, so landsstýrismaðurin ikki longur hevur heimild at selja kvoturnar á Flemish Cap á uppboðssølu.

Til § 2:
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi 19. september 2018**

Jørgen Niclasen